# Fuglafjørður mennist eisini í krepputíðum



**VINNULÍV** – Vit taka avbjóðingarnar í størsta álvara og vilja framhaldandi saman við vinnuni royna at finna bestu loysnirnar, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu

Vilmund Jacobsen

Hóast krepputíðir, er ikki líkt til, at vinnulívið í Fuglafjarðar kommunu hevur hug at gevast á hendur. Tað er heldur tvørtur ímóti. Talið av virkisbygningum í kommununi, sum eisini fevnir um Kambsdal og Hellurnar, veksur alsamt.

Vinnan í kommununi hevur ætlanir um at útbyggja, og aðrar ætlanir eru um nýbygging.

Borgarstjórin, Sigurd Simonsen, veit at siga, at smoltstøðin hjá Marine Harvest á Hellunum á seinasta býráðsfundi fekk byggiloyvið til ein 1.300 fermetra stóran virkisbygning.

– Men hetta er bara ein av byggiverkætlanunum, sum liggur fyri framman í kommununi, sigur hann.



*Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Nógv fyri stavn

Herfyri fekk JT-Electric útgravingarloyvið í samband við ætlanir at byggja ein 600 fermetra stóran virkisbygning á ídnaðarøkinum á Kambsdali.

Borgarstjórin veit eisini at siga, at á havnalagnum í Fuglafirði, sum verður rópt á Enninum, hevur Vónin fyri eini tíð síðan fingið byggiloyvið til ein 2.400 fermetra stóran virkisbygning. Ætlanin er, at hesin bygningur skal brúkast til arbeiði við flótitrolum.

Men vegna figgjarligt atlit hevur kommunan tó fyribils steðga á við landfyllingini, sigur Sigurd Simonsen.

## Aðrar ætlanir

Sandgrevstur, sum er eitt annað felag í Fuglafirði, hevur umsókn inni um pakkhús á havnalagnum, sum ætlandi skal verða einar 1.000 til 1.500 fermetrar stórt.

Stóra fóður-og mjølvirkið Havsbrún hevur júst latið Fuglafjarðar kommunu umsókn um at sleppa at víðka laksafóðurgoymsluna við ikki færri en 2.300 fermetrum.

Borgarstjórin sigur, at kommunan tekur avbjóðingarnar, sum soleiðis liggja fyri framman, í størsta álvara.

– Saman við vinnuni vilja vit framhaldandi royna at finna bestu loysnirnar – okkum øllum at gagni, sigur hann.

## Stór verkætlan

Í eina tíð hevur eisini verið arbeitt við eini stórari verkætlan í Fuglafirði um at byggja eitt matvøruvirki til uppisjóvarfisk.

– Henda ætlan er framvegis í gongd, og til hetta endamál er eitt økið, sum er heilar 10.000 fermetrar stórt, klárt at byggja á, sigur Sigurd Simonsen.

Ætlanin at byggja eitt góðskingarvirki til uppisjóvarfisk er ikki slept, tó at tað hevur drigið út at fáa íleggjarar til hesa verkætlan.

Umleið eitt ár er liðið, síðan Fuglafjarðar kommuna av álvara setti skjøtil á at fáa vinnuna í økinum at byggja hetta virki.

Kommunan hevur havt Farec International við Óla Samró at hjálpa sær, og í eina tíð hevur eisini verið leitað uttanlands eftir íleggjarum.

– Óli Samró er ikki knýttur at Fuglafjarðar kommunu

# Fiskaaling kannar góðskuna á alilaksi

**KUNNING** Nú Fiskaaling er farið í holt við nýggja útgávu av Aliblaðnum, verður greitt frá eini kanning av føroyskum alilaksi, sum felagið ger. - Hesar kanningarnar verða gjørdar fyri eitt nú at skjalprógva góðskuna á føroyskum alilaksi, sigur Fiskaaling

Vilmund Jacobsen

Fiskaaling er nú farið í holt við eina roynd at geva Alitíðindi útaftur.

Ymiskar royndir heilt aftur til sjeytiárini hava verið gjørdar at lýsa virksemið hjá Fiskaaling og í føroysku alivinnuni annars.

Seinasta royndin hjá Fiskaaling í so máta var Alitíðindi, sum felagið gav út árini 1996 til 2005, tá henda útgávan aftur datt niðurfyri.

– Vit á Fiskaaling hava nú sett okkum fyri at kunna alivinnuna og fólk annars nærri um virksemi felagsins. Tíverri er gjørt ov lítið við hetta seinnu tíðina og fyri at bøta um hetta, hava vit sett okkum fyri at geva blaðið Alitíðindi út aftur. Vit meta tað vera sera umráðandi, at vit javnan kunna um okkara virksemi og vóna vit, at vinnan og fólk annars við áhuga fyri alivinnuni tekur væl ímóti hesum, sigur Kristian Petersen, stjóri í Fiskaaling.

Hann leggur aftrat, at Alitíðindi ætlandi skal koma út eina ferð um ársfjórðingin.

## Góðskukanningar

Ein av greinunum í nýggju útgávuni snýr seg um góðskukanningar av laksi, sum Fiskaaling fer á øllum alifyritøkum í Føroyum. Hetta er ein verkætlan, sum byrjaði í mars 2010 og heldur fram til mars 2011.

– Hesar kanningarnar verða gjørdar fyri at skjalprógva góðskuna á føroyskum alilaksi, samanbera laks frá øllum alifyritøkunum í Føroyum og fyri at kanna, hvussu góðskan broytist við árstíðini, sigur Alitíðindi í nýggju útgávuni.

Lagt verður aftrat, at verkætlanin møguliga fer at geva ábendingar um øki, sum eiga at verða kannað nærri.

– Alifyritøkurnar fáa síni úrslit og miðaltølini fyri øll virkini sendandi annan hvønn mánað, og ein endalig frágreiðing verður skrivað, tá verkætlanin er liðug í komandi ári, sigur Fiskaaling.

*vilmund@sosialurin.fo*

